# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*11. mars fingu Røgvi og Brian hesa fittu lítlu systrina. Hon vigaði 2900 gram og var 50 cm. long. Foreldur teirra eru Malan Mikkelsen og Edvard Sørensen, og tey búgva á Viðareiði.*



*11. mars fingu Poula Norðbúð og Bill Mc. Leod Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur sum eitur Elin Maria. Hon var 52 cm long og vigaði 3050 gr.*

11. mars fingu Malan Mikkelsen og Edvard Sørensen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2900 gr.

12. mars fingu Kristina og Jákup Tausen, Funningsfirði, ein son, ið eitur Brandur Jákupsson Tausen. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr.

12. mars fingu Mathilda og Pól Johannessen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3100 gr.

13. mars fingu Súsanna Brekku og Bogi Hansen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3300 gr.

16. mars fingu Jóna Maria Malunardóttir og Sámal Edil Kyrrigerð, Vágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4450 gr.

18. mars fingu Hansi í Kálvalíð og Súni Jacobsen, Hósvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3450 gr.

19. mars fingu Bjørg Gøtuskeggi, Kambsdalur og Sámal Olsen, Toftir, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3520 gr.

21. mars fingu Tanja S. og Fróði L. Ejdesgaard, Oyri, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4750 gr.

**30 ár**
Leygardagin 24. mars fyllir Halla Poulsen, Fuglafirði, 30 ár. Dagurin verður hildin í Lonini í Fuglafirði frá kl. 18.00.

**50 ár**
Sunnudagin 25. mars fyllir Hildur Gunnarsdóttir, Hovi, 50 ár. Føðingardagurin verður hildin heima, leygardagin 24. mars frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**75 ár**
Í dag, 23. mars verður Hartvig Poulsen, skipari, Vágur 75 ár. Dagin verður hann burturstaddur.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. mars giftast Joan Zachariassen og Agnar Skorastein, Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður hjá Bergit og Elmar á Torvgøtu 15, frá kl. 21.00.

# Sunneva Háberg farin

Ì gjár andaðist Sunneva Háberg í Havn, 89 ára gomul. Sigast kann, at Sunneva nú var blivin gomul og veik, so hennara hvíld nú er henni væl unt. Sunneva var dóttir Onnu og Olaf Johansen, úr Rættará, og tey vóru 4 systkin. Umframt Sunnevu vóru tey Elias, Katrina og Anna Oluffa, sum nú er einsamøll eftir.

Sunneva giftist í 1945 við Knút hjá Mallu og Pola (Joensen) skómakara, og búsettust tey fyrst í kjallaranum hjá teimum í Konradsbrekku, men fyrst í 50-unum bygdu tey í Torfinsgøtu, har mong hava sitið væl.

Knút var mammubeiggi mín, so eg havi kent Sunnevu stórt sæð alt lívið. Eg vaks upp í Norðagøtu í 50-unum, og tá var tað "nakað" at hava ætt í Havn. Hetta hevði týdning, tá farið varð til Havnar at ferðast, og ein hevði ommu, abba og tríggjar mammubeiggjar at fara til. Tá var tað fast eisini at vitja Sunnevu og Knút. Sunneva var heimagangandi, sum tað kallaðist, so her var altíð opið hús. Tað var altíð hugnaligt hjá Sunnevu og Knút, og ein føldi seg altíð vælkomnan. Meðan Knút var tann meira formelli, so prátaði Sunneva alla tíðina um alt millum himmal og jørð, so saman við henni kom eingin at keða seg.



*Sunneva saman við ommudótrini Sunneva*

Tað, sum Sunneva tó var mest kend fyri, var hennara sangur. Hon verður roknað sum ein tann besti, um ikki tann besti, kvinnuligu sangarin í landinum. Hon byrjaði at syngja á kristiligum møtum longu sum 16 ára gomul, og hesum helt hon á við í ikki minni enn 60 ár. Tað eru tískil mong ættarlið, sum hava havt gleði av at hoyra Sunnevu syngja. Hon sang eisini inn á plátu, og eina ferð gjørdu Sunneva og Ingálvur av Reyni eina plátu saman. Tað má næstan hava verið sangur í heimsklassa! Knút var eisini sera musikalskur, og tey eru mong sum minnast hann spæla klaver, meðan Sunneva sang. Nú eru tey øll trý farin.

Sunneva hevði eitt sera lætt lyndi, men hon hevði tað ikki bert lætt í lívinum. Tað gekk illa hjá teimum báðum at fáa børn, men eftir 10 árum fingu tey ein fittan son í 1955, og eydnan tyktist at vera fullkomin. Men sonurin livdi bert fáar dagar og var hetta sjálvsagt ein sera stórur smeitur fyri tey bæði. Fimm ár seinni, í 1960, fingu tey Onnu, og tá skein sólin aftur í teirra lívi. Anna var nærum eitt undur, og hon arvaði tónleikaevnini hjá foreldrunum til gleði fyri mong. Men Anna gjørdist bert 36 ár, og tað var ein dyggur smeitur fyri Knút og Sunnevu at missa einkardótrina. Men børnini hjá Onnu, Knút og Sunneva, uppkallað eftir teimum báðum, gjørdust teirra eitt og alt, og høvdu tey nógva gleði av teimum báðum, og tað var eisini øvugt.

Seinnu árini gjørdust tó lítið hugalig hjá teimum báðum. Sunneva gjørdis minnisveik og hevur nú í fleiri ár verið á Lágargarði, har góð fólk hava verið um hana. Knút gjørdust eisini meira og meira ússaligur, og hann doyði í november 2005 beint eftir sín 85 ára føðingardag og tveir dagar eftir teirra diamantbrúdleypsdag.

Tey hava nú bæði fingið ta hvíld, sum tey hava søtliga uppiborið, og vit í ættini minnast tey við takksemi.

**ó.**

# Rani Wardum fimmti



Í dag, 23. mars, verður Rani Wardum, løgreglumaður í Havn, fimmti.

Rani byrjaði sum politistanæmingur sum 21 ára gamal tann 1. februar í 1979.

Eftir lokna útbúgving varð hann settur politistur í Havn.

1. februar í 1987 varð hann settur í starv í Århus til 1. juni 1989, tá hann varð settur aftur í starv í Havn, har hann framvegis starvast.

1. mars 2000 varð hann settur vaktleiðari í Havn.

**Dagurin**

**24. mars. Ulrika.** teir vita ikki, hvønn hetta halgi navnið sipar til.

**25. mars. Mariusmessa um várið.** til minnis um, at eingilin Gabriel boðaði Mariu Moy fræam at hon skuldi bera frelsaran í heim (Lukas 1, 26-38).

Griska navnið Maria er tað sama sum tað bebráiska Mirjam, týdningurin ókendur.

Hoyrist mýrisnípan lata uppi í luftini á mariumessu, skuldi kavi koma og tað sama, um ross lá fyri mariumessu.

*Vercelaus Ulricus Hammershaimb* føddur 1819.

**26. mars. Gabriel.** Beint eftir mariumessu er nevdur høvduðseingil Gabriel, sum bar tey góðu tíðindi.

Navnið merkir *Gudsmaður*.